# RÁFISKAKEYPARAFELAGIÐ

## ÁRSFRÁGREIÐING

## 2021

**Til aðalfundin 2. februar 2022**

# INNIHALDSYVIRLIT


Frásøgn nevndarinnar frá farna ári ........ 3

1. Um gongdina í felagnum ........ 3
2. Mál í árinum ........ 3
3. Gongdin í vinnugreinini ........ 5

Um Ráfiskakeyparafelagið ........ 7

Endamálið hjá Ráfiskakeyparafelagnum ........ 7

Nevndin í Ráfiskakeyparafelagnum ........ 7

Limir í Ráfiskakeyparafelagnum ........ 7

Limagjald í Ráfiskakeyparafelagnum ........ 7

Skjøl ........ 8

Viðtøkur felagsins ........ 8

# Frásøgn nevndarinnar frá farna ári

## 1. Um gongdina í felagnum

Á aðalfundinum í 2018 varð avgjørt, at Ráfiskakeyparafelagið fyribils skuldi vera minni aktivt, fara í dvala í eina tíð. Umsitingaravtalan við Føroya Arbeiðsgevarafelag varð broytt, so minni orka varð sett av til felagið, samstundis sum kostnaðurin minkaði.

Broytingarnar í umsitingaravtaluni viðførdu eisini, at nevndarlimirnir sjálvir í størri mun hava tikið sær av teimum bundnu uppgávunum hjá felagnum. Eitt nú hevur Jógvan Hansen umboðað felagið í Fiskivinnuráðnum, har felagið hevur fastan sess. Jens Pauli Petersen er varaumboð í Fiskivinnuráðnum.

Marner Pattinson hevur umboðað felagið í stýrinum fyri Fiskivinnuroyndir, sum veitir stuðul til verkætlanir at menna fiskivinnuna.

Jógvan Hansen og Jens Pauli Petersen røkja nevndarsessirnar hjá felagnum í nevndini fyri Kassamiðstøðini, sum felagið eigur helvtina av.

Sum heild hevur tað í størri mun verið upp til nevndarlimir í felagnum at røkja bransjuáhugamálini hjá Ráfiskakeyparunum.

Umskipanirnar í felagnum hava haft við sær, at fíggjaliga støðan er betrað. Eftir at felagið í fleiri ár á rað hevði hall, hava roknskapirnir seinnu árini víst eitt avlop.

Á seinasta aðalfundi, sum varð hildin í mai 2021, varð nevndin víðkað úr 3 upp í 5 limir, við tí endamáli at økja um virksemið. Málini, sum felagið serliga hevur haft á skrá, verða lýst niðanfyri.

## 2. Mál í árinum

*Starvsfólk úr 3. londum*

Við tí høga vinnutíttleika og lága arbeiðsloysi vit hava í løtuni, hevur tað verið sera torført at útvega starvsfólk til fiskaframleiðslu. Tað er torført at útvega starvsfólk úr norðurlondum og ES, og skipanin fyri at seta starvsfólk úr 3. londum hevur verið rættiliga ósmidlig.

Felagið hevur tí verið á fundi við undanfarna og núverandi landsstýrismann í arbeiðsmarknaðarmálum fyri at greiða frá trupulleikanum, við umbøn um at gera tað smidligari at seta og hava í starvi starvsfólk úr 3. Londum, uttanfyri Norðurlond og ES.

Landsstýrismaðurin hevur tikið henda spurningin í álvara, og hevur borið skjótt at at seta nýggja fast-track skipan í verk fyri starvsfólk úr 3. londum. Eftir nýggju skipanini kunnu føroyskir arbeiðsgevarar

verða undangóðkendir at seta starvsfólk úr 3. londum í starv, og umsóknirnar um arbeiðs- og uppihaldsloyvi verða viðgjørdar munandi skjótari enn áður. Skipanin hevur sum heild víst seg at virka væl higartil.

*Limatiltak um burðardygd*

Felagið skipaði á heysti 2021 fyri einum fakligum og sosialum tikltaki fyri limir felagsins. Tiltakið varð hildið á Hotel Hilton. Fyrst varð skipað fyri einum tiltaki um burðardygd, har Ana Elisabeth Holden-Peters og Durita í Grótinum løgdu fram. Ana Elisabeth Holden-Peters greiddi frá hví tað er neyðugt hjá føroysku botnfiskavinnuni at hava fokus á burðardygd, og Durita í Grótinum greiddi frá um nýggja felagið Faroe Islands Sustainable Fisheries, sum m.a. skal hava MSC-sertifiseringarnar av føroyska fiskiskapinum um hendi. Eftir hetta var kjak um evnið millum limirnar.

Aftaná fakliga tiltakið var høvi hjá limunum at tosa saman, og endað varð við einum døgurða.

Ætlanin er at skipa fyri líknandi limatiltaki í vár.

*Minkingin í upsafiskiskpainum*

At síggja til er eitt negativt samband millum ta nøgd av fiski, sum verður ald í Føroyum, og gongdina í upsafiskiskapinum. Tað ber tó ikki enn til at siga, hvørt alingin er orsøk til minkandi upsafiskiskapin. Felagið hevur tikið henda spurning upp við Havbúnaðarfelagið og myndugleikarnar. Felagið heldur, at hesin spurningur átti at verið kannaður nærri, hvørt talan kann vera um ávirkan frá alingini, ella um sambandið er tilvildarligt. Yvirhøvur er ov lítil vitan um uppvakstrarøkini hjá fiskayngli inni á firðunum, herundir eisini um alingin kann hava eina ávirkan, og um so er, hvussu stór henda ávirkan er. Eitt nú leitar seiðayngul sær inn í alinótirnar, og tá alifiskurin so verður tikin, endar seiðurin í kvørnini. Men tað er framvegis ógreitt hvussu stóra ávirkan hetta hevur á tilgongdina av upsa.

*Springaradráp*

Felagið luttók í desember 2021 á fundi, sum Løgmaður skipaði fyri við tí endamáli at eftirmeta springaradrápið í Skálafirði t. 12. september 2021.

Felagið greiddi m.a. frá hvørja ávirkan springaradrápið hevur haft á fiskaútflutningin. Tað er rættiliga ymiskt í hvønn mun springaradrápið hevur ávirkað feløgini. Hjá summum útflytarum av botnfiski hevur drápið haft stóra ávirkan, meðan tað hjá øðrum hevur verið lítil og eingin ávirkan.

Enn fyriliggur eingin niðurstøða frá eftirmetingini, sum Løgmaður hevur tikið stig til.

*Brasil*

Framvegis ber ikki til at útflyta føroyskan fisk til Brasil, tí Føroyar ikki hava heilsufrøðiliga góðkenning frá Brasilska heilsufrøðiliga matvørumyndugleikanum (MAPA). Brasilski matvørumyndugleikin skuldi koma til Føroya í síðst í 2019, men vitjanin varð fyrst útsett til 2020, og síðani fyribils avlýst vegna koronastøðuna.

Felagið hevur haft regluligt samband við almennu myndugleikarnar um málið, og eisini haft ein fund við landsstýrismannin í uttanríkismálum. Nýggjasta í málinum er, at brasilskir myndugleikar hava fráboðað, at teir koma til Føroya 4.-14. Apríl 2022 á eftirlitsvitjan. Vónandi verður eftirlitsvitjanin til nakað hesuferð, so góðkenningin kann fáast uppá pláss, og føroyskir fiskaútflytarar fáa ein nýggjan marknað at selja til. Tað eru serliga saltaðar fiskavørur, sum tað kann vera áhugavert at útflyta til Brasil, men aðrar vørur kunnu eisini koma upp á tal.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan ger eitt serligt yvirlit av fyritøkum, sum ynskja at verða góðkendar til at útflyta til Brasil.

## 3. Gongdin í vinnugreinini

Størsti trupulleikin í føroysku botnfiskavinnuni í dag er manglandi rávøra, og støðan hevur neyvan nakrantíð verið so ring sum nú.

Avreiðingarnar fyri 2021 vísa eina stóra minking í nøgdunum av vanligu botnfiskasløgunum, sum eru fiskaði í føroyskum sjóøki. Avreiðingarnar av toski undan Føroyum eru í nøgd minkaðar við 44%, svartkalvin við 33%, upsin við 27% og hýsan við 9% í mun til 2020. Avreiðingarnar av toski undan Føroyum vóru í fjør uml. 5.500 tons, og hetta er minsta úrtøkan av toski frá føroyskum havøki í nýggjari tíð.

Um avreiðingar í Føroyum frá fiskiskapi uttanfyri Føroyar verða taldar við, er lutfalsliga minkingin samlað sæð ikki líka stór, hóast nøgdirnar í teimum vanligu botnfisksløgunum tilsamans eru væl minni í 2021 í mun til 2020, hýsan tó undantikin.

Tað sæst eisini, at innflutningurin av rávøru til virkingar er øktur munandi. Tað er serliga úr Noregi, at frystur heilur fiskur verður innfluttur til virkingar í Føroyum. Innflutta rávøran hevur so við sær, at útflutningurin av botnfiskavørum úr Føroyum ikki minkar líka nógv sum fiskiskapurin. Fyri virkini er kostnaðurin av innfluttari rávøru tó vanliga hægri enn fyri rávøru, sum verður landað í Føroyum. Eitt nú er flutnings- og fíggingarkostnaðurin hægri.

Útflutningsvirðið av mest vanligu botnfiskasløgunum toski, hýsu og upsa var nærum óbroytt í 2021 í mun til 2020. Hóast hægri prísir minkaðu útfluttu nøgdirnar samsvarandi, so tilsamans stóð útflutningsvirðið at kalla í stað.

Árið í fjør var framvegis nakað merkt av COVID-19 støðuni í Evropa, men í nógv minni mun enn í 2020. Tað sæst eisini, at prísirnir hava rættað seg nakað aftur.

Lønargjaldingarnar í fiskavøruídnaðinum hækkaðu eitt vet í 2021 í mun til 2020, frá 406,3 mió kr í 2020 upp í 412,3 mió kr. í 2020. Hetta svarar til eina hækking á 1,5%, men lønargjaldingarnar eru framvegis lægri enn tær vóru í 2019. Fiskavøruídnaðurin fevnir í hagtølunum hjá Hagstovuni um bæði flakavirki og uppisjóvarvirki umframt mjøl/fóðurframleiðslu. Ali- og kryvjivirki eru ikki partur av hagtølunum.

Umframt beinleiðis lønargjaldingar hevur avleidda virksemið frá fiskavøruídnaðinum eisini stóran samfelagsbúskaparligan týdning. Avleidda virksemið er t.d. innkeyp, fígging, flutningur, umvælingar, viðlíkahald, og aðrar vørur og tænastur, sum fyritøkur í fiskavøruídnaðinum eftirspyrja.

*Marknaðaratgongd*

Felagið hevur seinastu árini roynt at sannført myndugleikarnar um at nýta orku uppá at tryggja føroyskum fiskaútflytarum betri marknaðaratgongd. Okkara kappingarneytar brúka nógva orku uppá at betra uppaftur meira um sína marknaðaratgongd. Hjá einum lítlum landi sum Føroyar, krevur tað eitt áhaldandi arbeiði frá føroysku myndugleikunum at sannføra myndugleikarnar í einum størri landi um, at tey skulu nýta orku uppá handilsavtalur og heilsufrøðiligar avtalur við Føroyar.

Tað er neyðugt at arbeiða við at betra um atgongdina á so nógvum av teimum áhugaverdu marknaðunum fyri føroyskar fiskavørur sum gjørligt, so tað ber til at selja aðrastaðni, tá umstøðurnar á einum marknaði gerast truplari.

Brexit hevur gjørt tað truplari at útflyta fisk til og umvegis bretska marknaðin, og útlit eru til, at tað verður uppaftur truplari í hesum árinum, so hvørt sum krav um innflutning umvegis marknaeftirlitsstøð, um heilsuváttanir og um fysiska eftirkanning av vørunum verður sett í gildi seinni í 2022.

Stóra Bretland er heldur ikki við í pan-evropeisku kumuleringsavtaluni um upprunareglur, og hetta er eisini við til at gera handilssambandið við Stóra Bretland tvørligari.

# Um Ráfiskakeyparafelagið

## Endamálið hjá Ráfiskakeyparafelagnum

Endamál felagsins er at savna allar føroyskar ráfiskakeyparar til at útinna felags áhugamál og at verja áhugamál limanna.

## Nevndin í Ráfiskakeyparafelagnum

Jógvan Hansen, nevndarformaður

Jens Pauli Petersen, næstformaður

Jógvan Gregersen, nevndarlimur

Magnus Jespersen, nevndarlimur

Marner Pattinson, nevndarlimur

## Limir í Ráfiskakeyparafelagnum

Í felagnum vóru t. 28. januar 2022 hesir limir:

1. Atlantic Seafood
2. Delta Seafood
3. Faroe Origin
4. Fiskavirkið/PRG
5. Fofish/Norðfra
6. JMA-Fram Saltfiskavirki
7. Kósin
8. Nevið
9. Rainbow Seafood
10. Sandoy Seafood
11. Tavan
12. Vaðhorn Seafood
13. Vestmanna Seafood

## Limagjald í Ráfiskakeyparafelagnum

Limagjaldið í felagnum er kr. 2.000 um árið.

# Skjøl

## Viðtøkur felagsins

**§ 1**
Navn felagsins er FØROYA RÁFISKAKEYPARAFELAG og er heimstaður felagsins í Tórshavn.

**§ 2**
Endamál felagsins er at savna allar føroyskar ráfiskakeyparar til at útinna felags áhugamál og at verja áhugamál limanna.

**§ 3**
Ráfiskakeyparar kunnu gerast limir í felagnum við skrivliga at venda sær til felagið, og um nevndin játtar teimum limaskap.

Avgerð nevndarinnar kann av einum limi kærast fyri limfund, sum tekur endaliga avgerð.

**§ 4**
Aðalfundurin hevur hægsta ræðið í felagnum.

Atkvøðurætt á aðalfundinum hava felagslimirnir. Eitt árs eftirstøða inniber miss av atkvøðurætti.

Hvør limur hevur eina atkvøðu fyri hvørji byrjandi 1.000 tons av ráfiski, tó í mesta lagi 10 atkvøður.

Er limur eitt felag, eigur hann, ið skal útinna atkvøðurættin, áðrenn aðalfundin at prógva henda rætt fyri felagsformanninum ella fyri aðalfundinum.

Einans limur kann møta sum fulltrúi fyri annan lim og bert við skrivligari fulltrú frá avvarandi limi.

**§ 5**
Tann vanligi aðalfundurin verður hildin eina ferð um árið - ikki seinni enn 1. mai.

Nevndin ásetir tíð og stað fyri aðalfundin, sum verður kunngjørdur limunum brævliga við minst 8 daga ávaring.

**§ 6**
Øll mál, felagnum viðvíkjandi, kunnu viðgerast á vanligum aðal- ella eykaaðalfundi. Lógarbroyting kann bert fara fram, tá ið uppskot um lógarbroytingina er sett fram frammanundan, og uppskotið er lýst í kunngerðini um aðalfundin.

Til at broyta felagslógirnar krevst, at í minsta lagi 2/3 av teimum greiddu atkvøðunum eru fyri uppskotinum og at helvtin av limunum hava atkvøtt fyri.

Møta ikki nóg nógvir limir á vanliga aðalfundinum, har uppskot er frammi um at broyta lógirnar ella aðra samtykt, ið krevur í minsta lagi helvtina av øllum, ið eiga atkvøðurætt, skulu atkvøða fyri, kann samtykt verða gjørd um at kalla saman til eykaaðalfundar. Á eykaaðalfundinum kann slíkt uppskot verða samtykt við minst 2/3 av teimum atkvøðum, ið eru umboðaðar á fundinum, sjálvt um ikki helvtin av limunum er á fundi.

Dagsskráin á vanliga aðalfundinum er henda:
1. Framløga av limalista

2. Frásøgn nevndarinnar frá farna ári.
3. Framløga av grannskoðaðum roknskapi frá farna ári.
4. Val av nevnd.
5. Val av grannskoðara.
6. Ymiskt.

Allar samtyktir á aðalfundinum skulu verða skrivaðar í gerðabókina.

Um ikki formaðurin leiðir fundin, kann aðalfundin velja ein fundarstjóra.

Har ikki annað er tilskilað í lógunum, verða allar avgerðir samtyktar við vanligum meiriluta.
Eingin kann greiða atkvøðu í egnari søk.

**§ 7**
Eykaaðalfundurin kann verða hildin, tá ið nevndin heldur tað verða neyðugt ella tá ið limir, ið umboða minst 10 atkvøður, krevja tað. Nevndin avger tíð og stað. Lýst verður til eykaaðalfund á tann hátt og so langa tíð frammanundan, sum nevndin avgerð.

**§ 8**
Í nevndini sita 3-5 limir, ið aðalfundurin velur millum felagslimirnar fyri 2 ár ísenn. Annað hvørt ár stendur helvtin av nevndarlimunum fyri vali, og annað hvørt ár stendur hin helvtin fyri vali. Er talið av nevndarlimum ólíka tal, verður talið av nevndarlimum, sum standa fyri vali funnið við at runda upp til nærmasta heila tal annaðhvørt ár, og rundað niður til nærmasta heila tal annaðhvørt ár.

Umframt verður valdur 1 tiltakslimur hvørt ár.

Nevndin velur sjálv formann sín og næstformann. Á hvørjum nevndarfundi verður gerðabók førd, sum verður undirskrivað av hjástøddu nevndarlimum.

Nevndin setur kassameistara og skrivara.

**§ 9**
Nevndin tekur sær av áhugamálum felagsins, hevur fyrisætið við sjálvum felagnum og ansar eftir, at felagsins lógir og samtyktir verða hildnar.

Eingin kann verða við til av viðgera sína egnu søk. Allar avgerðir verða samtyktar eftir vanligum meiriluta.

**§ 10**
Felagsins roknskaparár er álmanakkaárið.

Roknskapur verður grannskoðaður av felagsins roknskapargrannskoðara. Rokn-skapurin fyri árið skal liggja frammi, uppgjørdur og grannskoðaður minst 14 dagar áðrenn ársaðalfundin.

**§ 11**
Hvør limur hevur skyldu til gjølla at halda felagsins lógir. Tær avgerðir, ið aðal-fundurin ella nevndin taka, eru bindandi fyri limirnar.

Um limur tí ikki vil ganga undir eina tílíka avgerð, kann nevndin koyra hann úr felagnum uttan ávaring, og kann hann ikki gerast limur aftur tey næstu tvey árini. Áðrenn hann verður limur aftur, skal hann gjalda alla skuld sína til felagið.

Tvey árs eftirstøða inniber, at limur av sær sjálvum missir limaskapin. Áðrenn hann verður limur aftur, skal hann gjalda alla skuld sína til felagið.

**§ 12**
Árliga limagjaldið er kr. 2.000 um árið. Innmeldingarlimagjaldið er kr. 2.000 kr. Inngoldið limagjald og innmeldingarlimagjald verður nýtt til rakstur felagsins í tann mun, sum nevndin, ið stendur aðalfundinum til svars, heldur at tørvur er á.

Skuldi felagnum verið tørvur á meira peningi fyri at fremja serlig mál, so kann nevndin royna at útvega henda pening við tilskotum frá limunum. Eisini kann aðalfundurin, til útvegan av slíkum peningi, álíkna limunum eykagjald á hvørjum kalendarári.

Ognir felagsins verða varveittar á tryggan hátt í banka, sparikassa ella í lánsbrøvum.

Nevndin hevur heimild til at tekna lutapening ella partapening í øðrum feløgum eftir góðkenning frá aðalfundinum.

Tekur felagið lán ella veðsetir ogn, mugu minst 4 nevndarlimir skriva undir.

Felagið verður bundið við undirskrift formansins ella honum, ið er í hansara stað. Til dagligu umsitingina av sjálvum felagnum kann nevndin geva skrivaranum fulltrú.

**§ 13**
Siga seg burtur úr felagnum kann eingin uttan við innskrivaðum brævi til felagið og við 6 mánaða ávaring, til ein 1. juli. Tó kann eingin fara úr felagnum meðan arbeiðstræta er, uttan so er, at nevndin gevur loyvi til hetta.

**§ 14**
Felagið kann verða tikið av við aðalfundarsamtykt, men einans tá ið minst 2/3 av samlaðu atkvøðunum í felagnum atkvøða fyri. Uppskot um felagsins avtøku má tó verða lýst fyri limunum eins og uppskot um lógarbroyting.

**§ 15**
Verður felagið tikið av, verða ognir felagsins at nýta til frama fyri føroyska fiskivinnu, soleiðis sum aðalfundirn tekur avgerð um.